# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hallur Jacobsen

### in memoriam

**føddur 20.9.1979 deyður 02.06.2005**

Sigla vit í gjálvum.
Hanga fløgg í hálvum,
Hallur, hann er farin!
Farin? Spyrt tú varin!

Sólin lá um tindar,
lýggir blástu vindar,
borin alvi góður,
frøddi faðir, móðir.

\- - -

Liggur frost um tindar!

Kaldir blása vindar!

Troyttur møði rindar!

Fátt kann feigum forða!
Kalt kenst millum borða.

Syrgja systkin, faðir, móðir.
einkarsoni vart tú góður;
gráta nú í sorgum.

Komi aftur morgun!
Loysi tey úr sorgum,
beri troyst at borgum,
hann, á øllum hevur ráð,
hann, tit kunnu líta á!

Farin Hallur, farið smílið!
Tú í Harrans hondum hvíli.

**Hóri 05-06-05**

### Andlát og jarðarferðir

Hans David Jacobsen, í Syðrugøtu, vanliga nevndur Hans David á Skansa, andaðist týsdagin, 7. juni á Umlættingarheiminum í Syðrugøtu, 93 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Damgarð Petersen, Klaksvík, fer til gravar úr Christianskirkjuni fríggjadagin, 10. juni klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Damgarð, kunnu lata ein peningagávu á konto í Føroya Banka.

Jarðarferðin hjá Annu Elisabeth Jacobsen, Tórshavn verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin, 10. juni klokkan 13.

Henrietta Frederikka Skeel Kirke (Jetta), fødd Vang, Kaldbak fer til gravar úr Nazaret í Kaldbak fríggjadagin, 10. juni kl. 14

## Ættarstevna hjá Marin og Sámal Jákup Jacobsen

Eftirkomarar hjá Marin og Sámal Jákup Jacobsen í Skopun ætla næstkomandi vikuskifti at seta hvørjum øðrum stevnu í Skopun.

Ætlanin er fyrst at hittast í Samljóð leygardagin 18. juni til morgunmat. Aftaná verður vitjað í gamla kirkjugarði, har blómur verða lagdar á gravirnar hjá Marini og Sámal Jákupi, sum vórðu borin í heim ávikavist í 1850 og í 1854.

Seinnapartin verður hugnaløta við heitinum "Meg minnist" í Samljóð, har eisini ein kaffimuður verður drukkin, afturvið práti um gamlar dagar.



*Tær báðar – Vígdis Johannesen (vm.) og Elisa Ingebrigtsen – eru spentar uppá ættarstevnuna í Skopun*

*Mynd: Niels Uni Dam*

Um kvøldið verður døgurði við trimum rættum og aftaná verður dansur. Sunnudagin kl. 14 verður aftur farið í Samljóð til ábit.

Tað eru fýra av eftirkomarunum hjá Marini og Sámal Jákupi Jacobsen sum skipa fyri, og taka tey eisini ímóti tilmeldingum til tiltakið. Hesi fýra eru Vígdis Johannesen, Elisa Ingebrigtsen, Sámal Johannesen og Gudmund Jacobsen.

## 45 ár á Fossáverkinum

**Mánadagin 6. juni hevði Kári Nielsen verið í starvi hjá SEV á Fossáverkinum í Vestmanna í 45 ár. Hann byrjaði 19 ára gamal sum vanligur arbeiðsmaður, men fór seinni at ganga á vakt**



Hann kennir hvønn krók á Fossáverkinum hjá SEV í Vestmanna, har hann hevur starvast í 45 ár.

6. juni 1960 fór Kári Nielsen, 19 ára gamal, til arbeiðis hjá SEV á Fossáverkinum í Vestmanna, sum varð alment tikið í nýtslu seks ár frammanundan, 5. mai 1954.

Arbeiðslívið hjá Kára byrjaði kortini, tá hann 15 ára gamal fór at vera ørindadrongur í handlinum hjá Niels Winther Olsen í Vestmanna, vanliga nevndur Niels hjá John. Eftir at hava verið ørindadrongur í 13 mánaðir fór Kári at sigla við fyrsta Bliki hjá Skipafelagnum, har hann var í umleið trý ár, til hann fór á Fossáverkið.

Hansara fyrsti arbeiðsgevari, Niels Winther Olsen, sum var systkinabarn gamla SEV-stjóran, Hjalgrím Winther, vísti SEV-stjóranum á Kára, tá hann leitaði eftir arbeiðsmanni til lutfalsliga nýggja Fossáverkið.

Kári byrjaði sum vanligur arbeiðsmaður og gjørdi alt fyrifallandi arbeiði á verkinum og rundan um verkið. Nógv varð og verður framvegis gjørt burturúr at halda verkið reint.

Tá ið Kári byrjaði vóru tveir maskinmeistarar í føstum starvi á Fossáverkinum. Tað vóru verkmeistarin, Gustav Poul Kaiser og Jógvan Petersen. Teir gingu á vakt og ansaðu turbinunum. Kári fekk áhuga fyri teirra arbeiði, og teir lærdu hann at seta turbinurnar í gongd. Hann lærdi sum frá leið meira og meira, og seinni var hann frítíðaravloysari fyri hinar.

Maskinmenninir búðu nærhendis Fossáverkinum, so fyrstu árini vóru ongar náttarvaktir, men tá SEV avgjørdi at hava fólk á verkinum um náttina eisini, eftir at elnetið var meira útbygt, fekk Kári fastar vaktir á verkinum.

Fossáverkið hevur altíð havt ein stóran leiklut í føroyska elkervinum. Verkið samskipar framleiðsluna á meginøkinum og gevur t.d. hinum verkunum boð um, nær og hvussu nógv tey skulu framleiða fyri at nøkta streymtørvin.

Kári hevur verið á vakt manga illveðursnáttina, tá alt slóknaði, og neyðugt varð at senda menn á fjøllini. Men seinastu 20 árini er nógv broytt, og streymslitini eru munandi færri í dag, tí elnetið er tryggari. T.d. er stórur partur av netinum kaðallagdur.

Kári hevur eisini verið á vakt á Fossáverkinum, tá onnur hava havt frí. Hann hevur hesi 45 árini mangan hildið jólaftan, páskadagar og hvítusunnudagar á verkinum.

Í sínum starvi á Fossáverkinum hevur Kári sæð nógvar broytingar fara fram í føroysku ravmagnssøguni. Hini verkini í Vestmanna, Heygaverkið og Mýruverkið, vórðu bygd í sekstiárunum. 60 kV linjan varð løgd úr Vestmanna til Havnar og Skálabotn í 1961. Sundsverkið varð bygt í sjeytiárunum, og í áttatiárunum varð farið undir vatnorkuna í Eysturoynni.

SEV verður 60 ár næsta ár, og Kári Nielsen hevur verið við tríggjar fjórðingar av tíðini, Elfelagið hevur á baki.

## Við Smyrli í 30 ár

1975: Týsdagin í hesi vikuni vóru 30 ár liðin síðani núverandi Smyril kom fyrstu ferð á Tvøroyri.

Smyril legði frá landi úr Keypmannahavn sjálvan grundlógardagin kl. 16 og kom á Tvøroyri leygarkvøldið 7. juni 1975, beint tá útvarpið byrjaði kl. 18:30.

Ætlanin var at sigla á Havnina, men útróðrarverkfallið, sum tá var, forðaði hesum. Tí varð ístaðin lagt at á Tvøroyri.

Sum myndin vísir varð eisini roynt at forða Smyrli í at leggja til bryggju har. Men hesin báturin tók seg burtur frá, og tí kundi hetta flaggskip okkara tá, leggja at landi fyrstu ferð í føroyskari havn.

*Kelda: Árið ið fór*

